# ELLA


*Á landsfundi í morgin skulu sóknarumboð atkvøða um, hvørt Føroya Fiskimannafelag skal halda fram sum partur av Samtaki ella ikki*
*Mynd: Karstin Vang*

heimahoyrandi á Toftum, Nú er skipið heimahoyrandi á Strondum, og Mortan er eisini ein av eigarunum.

Næst besti línubátur í ár er Stapin, sum er heimahoyrandi á Toftum. Stapin hevur fiskað fyri slakar 14 miljónir krónur, og skipari er Jákup E. Eidesgaard, ið er granni hjá Mortani á Eiði.

Útgerðarmaður hjá Kambi og Stapanum er hin eini og sami, Kristmund Johannesen, sum hevur skrivstovu í Frostgoysmluni á havnalagnum hjá Runavíkar havn.

## Longa og brosma

Mortan Mortensen hevur ført línuskip, síðan hann var 27 ára gamal í 1988.

– Fyrsta skipið, eg førdi burtur av, var Thomas Nygaard. Eg fór at føra Thomas Nygaard í 1989 og førdi førdi skipið í fimm ár. Síðan fór eg umborð á línuskipið, Sigmund.

Mortan Mortensen sigur, at nú so nógvur smátoskur hevur verið at fingið í ár, hava teir fyri tað nógva roynt á djúpari vatni.

– Ein stórur partur av veiðini hjá okkum í 2010 hevur soleiðis verið longa og brosma, sigur royndi skiparin.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Reiðarar við víðfevndum krøvum

**AÐALFUNDUR** – Gongdin í samráðingunum, sum eru í løtuni, bendir ikki á nakra skjóta semju. Tað er serliga fyri fiskiskipini, at mótparturin hevur sett fram rættiliga ósmæðin krøv, sigur Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag

Vilmund Jacobsen

Aðalfundurin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag verður hildin í morgin, týsdagin 28. desember í Norðurlandahúsinum, og fundurin byrjar klokkan 11.

Fyrsta mál á skránni á aðalfundinum verður ársfrágreiðing um virksemið hjá felagnum, og her fer formaðurin, Eyðstein Djurhuus, at greiða frá.

Roknskapurin verður framlagdur til góðkenningar, eins og val verður at nevndarlimum, grannskoðara og tiltaksgrannskoðara.

Ásetan verður av limagjaldi, og síðan verður "ymiskt" á skránni.

## Umráðandi at møta

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, sigur, at umráðandi er, at limir møta til aðalfundin.

– Tað er umráðandi, at so mangir sum gjørligt møta. Um felagið framhaldandi skal veita limum sínum eina nóg góða tænastu, er neyðugt at hoyra, hvørji sjónarmiðini hjá limunum eru, sigur formaðurin.

Aðalfundurin hjá FSN verður hildin í nýggju fundarhøllini í Norðurlandahúsinum, sum nevnist "Skálin".

– Vit meta hetta hølið vera sera vælegnað til okkara aðalfund, sigur formaðurin.

## Samráðingar

Eyðstein Djurhuus vísir á, at í løtuni eru sáttmálasamráðingar fyri bæði fiskiskipaflotan og Strandferðsluna.

– Gongdin í samráðingunum benda ikki á nakra skjóta semju. Tað er serliga fyri fiskiskipini, har mótparturin hevur sett fram rættiliga ósmæðin krøv. Millum annað verður kravt, at oljan skal verða loyvd felagsútreiðsla í øllum sáttmálum. Eisini eru onnur víðfevnd krøv sett fram, sigur formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Eyðstein Djurhuus, nú aðalfundur verður í morgin.

Sáttmálin fyri farma- og frálandaskip er uppsagdur til at fara úr gildi 1. mars 2011.

*vilmund@sosialurin.fo*


*- Tað er umráðandi, at so mangir limir sum gjørligt møta til aðalfundin, sigur formaðurin, Eyðstein Djurhuus*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*